**Landsins besta bilaleiga**



Ring: flogvøllurin 212 765 ella Tórshavn 217 535

Johs. Berg · Staravegur 1 · 100 Tórshavn

AVIS We try harder



3-2 //: 23-19 //: 5-3 //: 2-1 // 22 -24

B71 //: TJALDUR //: HAVNARBÁTURIN //: GÍ NEISTIN //: HB //: HVESSINGUR //:

ÍTRÓTTUR //: HONDBÓLTUR //: FÓTBÓLTUR //: TALV //: SVIMJING

**Okkum tørvar ítróttarskrivara**

Dámar tær ítrótt? Dugir tú at arbeiða sjálvstøðugt og liggur væl fyri at skriva?

So ert tú kanska júst persónurin, sum vit sóknast eftir á ítróttaredaktiónini.

Ítróttaskrivingin hevur seinastu nógvu árini verið raðfest ovarliga á Sosialinum, og fyri framhaldandi at halda fast um oddastøðuna á økinum sóknast vit tí eftir einum medarbeiðara. Talan verður í fyrstu syftu um parttíðarstarv.

Umframt ítróttarskrivingina á Sosialinum verður partur av uppgávuni røkt av navnaøkinum, www. sportal.fo.

Vit rokna við, at tú hevur ein breiðan áhuga fyri føroyskum ítrótti, herundir ikki minst vetrarítróttargreinum. At tú ert álítandi og hevur góðan kunnleika til føroyska málið, og at tú hevur góð evni at bera teg fram á skrift.

Umsøkjarar við journalistiskari útbúgving hava fyrimun, men er hetta tó eingin treyt.

Er ynski at fáa nærri at vita um starvið, eru áhugaðir umsøkjarar vælkomnir at seta seg í samband við Jonhard Hammer á tlf. 223 369 ella Eirik Lindenskov á tlf. 216 409. Ella við at senda teldubræv til jonhard@sosialurin.fo ella eirikur@sosialurin.fo

Umsóknir skulu verða okkum í hendi innan 20. oktober 2003

**Umsóknir skulu sendast til:**

Sosialurin
postsmoga 76
110 tórshavn

Merkið brævbjálvan **»umsókn«**

Sosialurin

Sosialurin er eitt livandi og spennandi arbeiðspláss. Her starvast umleið 25 fólk. Uppgávurnar eru bæði áhugaverdar og fjølbroyttar. Blaðið kemur út fimm ferðir um vikuna.



*Hesin veðrurin vigaði 108 pund. Hann er undan eini ær hjá Jakku í Hjøllum. Á myndini síggja vit feðgarnar, Súna og Jakku*

# Góður heimaseyður í Hjøllum

**5 veturgamlir veðrar vigaðu meira enn 90 pund í miðal.
– So væl hevur ongantíð skorist áður, sigur Súni í Hjøllum, sum átti stóru veðrarnar**

SKURÐUR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin*

Tann léttasti vigaði 78 og tann tyngsti 108 pund.

Ikki smávegis seyður, má sigast.

Eins og nógvir aðrir menn kring landið, sum eiga ella hava atgongd til jørð, hevur Súni í Hjøllum á Toftum havt tað sum ítriv í fleiri ár at hava heimaseyð.

Sama ítriv hevur pápin, Jakku og beiggin, Óli, sum býr í Suðuroy.

Seinasta heyst setti Súni 5 veðurlomb við, og nú alt er fingið til høldar, vigaðu hesir 5 veturgomlu veðrarnir meira enn 90 pund í miðal!

Tann størsti vigaði 108 og tann næststørsti 100 pund. Hinir tríggir vigaðu ávikavist 84, 83 og 78 pund.

- Hetta er met hjá okkum, sigur Súni.

Hann vísir á, at í 1999 vigaði ein veturgamal veðrur 104 pund, og tað er næststørsti seyðurin, hann hevur dripið.

## Stórir "hálvbrøður"

Súni sigur, at veðrarnir hava gingið á Trøðni í Hjøllum.

- Pápin, Jakku, hevur helvtina av Trøðni, meðan systkinabarnið, Sámal Olsen, hevur hina helvtina. Tað er á jørðini hjá Sámali, hesir 5 veðrarnir hava gingið.

Hann sigur, at veðrurin, sum í ár vigaði 108 pund, er undan eini ær hjá pápanum.

- Tá ið eg fekk hetta lambið frá pápa í fjør heyst, vigaði tað um 40 pund, sigur Súni.

Næststørsti seyðurin í ár – tann, sum vigaði 100 pund – er, sum eigarin tekur til, "hálvbeiggi" til hendan størsta.

## Heima og úti

- Vit hava eitt seyðahús omanfyri hjá pápa, og her stendur seyðurin inni frá oktober til umleið 20. mai, tá ið hann fer útaftur á trøðna.

Súni í Hjøllum sigur, at um veturin fær seyðurin nógv hoyggj og eitt lítið sindur av kraftfóðuri, graspillarum og øðrum, sum felir frá borðinum.

- Tað er ikki fyrr enn um heystið, at vit veruliga fara at geva seyðinum kraftfóður, sigur hann.

VARPIÐ

Skráir og ummælir
Hvønn fríggjadag

20 síður heft, - so tað heldur alla vikuna

SvF • DR1 • DR2 • BBC Prime • Canal+ • Canal+ Gul • Canal+ Blá TV • Danmark 1 • TV Danmark 2 • 3+ DK 4 • TV 1000 • TV3 dk • Animal Planet • BBC World • CNN • Cartoon Network • Discovery Channel Euro Sport • MTV • National Geographic • TCM • Travel Channel • VH1 • TV2 Zulu • GOD Channel • Lindin • Útvarp Føroya • Rás 2



# Ein upplivingarrík ferð at enda komin



*Heðin Mortensen og konan Hjørdis framman fyri Lincoln Memorial*

**Í Washington er heilt øðrvísi enn í New York, meira friðarligt og meira trø og vøkstur. Vit hava sæð The Capitol, Hvítu Húsini og annars vitja søgulig støð og annað. Ein spennandi og minnilig ferð er um at vera komin at enda.**

NEW YORK
*Heðin Mortensen*

Mánamorgunin 13. oktober var túrurin í New York at enda komin, og farið varð við bussi til Washington D.C. klokkan 10 fyrrapartin. Hetta var sjálvan Columbus-dagin, sum er frídagur í USA, og sera nógv ferðsla var á vegunum, so vit vóru ikki frammi fyrr enn klokkan 17.

Veðrið var av tí allarbesta við sól av bláum himli, so tað var sera vakurt at hyggja út, meðan vit koyrdu. Afturímóti New York, so er her sera nógvur vøkstur og nógv trø, og leyvið á trøunum er nú við at skifta til teir eyðkendu heystlitirnar, sum røkka frá gulum til myrkareytt. Ótrúliga vakurt.

Her er í Washington er heilt øðrvísi enn í New York. Her er meira friðarligt og ikki so nógv ferðsla í gøtunum, sum eru sera breiðar. Vit búgva á einum hugnaligum gistingarhúsi í Georgetown. Tað tekur ein góðan tíma til gongu hiðani til miðbýin.

Fyrsta kvøldið spákaðu vit okkum ein túr her í Georgetown, og eftir Keybrúnni, sum er uppkallað eftir Francis Scott Key, ið yrkti sangin »The Star Spangled Banner« í 1812, sum í 1931 gjørdist tjóðsangurin hjá amerikanarum.

## Gestir hjá danska sendiharranum

Fyrrapartin týsdagin var fundur á donsku sendistovuni, har sendiharrin Ulrik Federspiel tók ímóti og greiddi frá arbeiðnum har. Seinnapartin vórðu vit víst runt í The Capitol, har kongressin heldur til. Ótrúliga flottur bygningur við nógvum standmyndum, málningum og útskeringum. Ikki minst var stóri kupulin eitt satt meistaraverk, prýddur av listamonnum úr Italiu.

Vit vóru eisini í høllini, har umboðsmannatingið heldur til. Tað telur 435 limir, harav 65 eru kvinnur. Í senatinum eru 100 limir, og 10 av teimum eru kvinnur.

Vit fingu eina rúgvu at vita um arbeiðsgongdina har í bygninginum, og eisini gjølliga frágreiðing um tey ymsu tíðarskeiðini, bygningurin er bygdur.

Um kvøldið vóru vit til døgurða hjá sendiharranum, sum hevur íbúð beint við sendistovuna. Í hesum sambandi kann eg líka nevna, at beint yvir av sendistovuni býr Hillary Clinton.

## Søgurikur býur

Nógv søguligt er at síggja í Washington, men ikki ber til at vitja øll tey søguligu støðini eftir einum degi, so vit máttu velja nøkur burtur úr rúgvuni.

Sjálvandi vóru vit og sóu Hvítu Húsini, men ikki eydnaðist til at sleppa inn. Fingu at vita frá sendistovuni, at húsini hava verið stongd fyri vitjandi í eina tíð, og at tað tekur umleið ein mánað af fáa atgongumerki til eina rundvísing.

Lincoln Memorial var stórsligið at síggja, eins og Washington-monumentið, og tey liggja í einari snórbeinari linju við The Capitol. Eisini vóru vit á søvnum, eitt nú Holocaust Memorial Museum, sum rúmar alla jagstranina av jødum undir krígnum.

Haðani gingu vit til jarnbreytastøðina Union Station, sum er bygd í 1908. Ein sera stórsligin bygningur, sum í fimtiárunum var heilt forfallin. Í nítiárunum er hann renoveraður og húsar í dag matstovum og handlum av øllum slagi, eins og skrivstovum, so har kemur nógv fólk. Framman fyri bygningin er stór standmynd av Columbus, sum er avmyndaður við einum indiarara høgru megin og einum europeara vinstru megin.

## Ferðin endar

Í morgin endar ferðin her í USA við at vitja verður í Pentagon og Heimsbankanum, og vit rokna við, at tað verður ein forvitnisligur túrur. Klokkan 17.30 verður flogið úr Washington aftur til Danmarkar, og eru vit har fríggjamorgunin klokkan 7.30, tí nú skulu vit flyta klokkuna seks tímar fram, og tað fara vit nokk at merkja.

So var ikki meira at frætta úr USA á hesum sinni. Ein lærurík og minnilig ferð er at enda komin, og gott verður at koma heimaftur til Føroyar.

Veturin 2004

Skíðferð til Alpurnar

Farið verður úr Føroyum 16. og 23. januar 2004.
Vit standa á skíðum í Canazei í Italien, har gist verður í 7 nætur.

Íroknað prísin er túrurin úr Føroyum til Canazei t/r, ferðaavgjøld, innivist í íbúð á hotel umframt 7 daga liftkort.

Eftir ynski, skipa vit eisini fyri skíferðum til m.a. Fraklands, Italien, Eysturríki og Kanada. Prísir úr 4810,- pr. pers.









Eyka:
Innivist á Hotel Phoenix**** 545,- dkk fyri náttina í dupultkamari.
Íroknað er morgunmatur og ein léttur 2-rættur døgurði
Vit hjálpa eisini við øðrum gistingarmøguleikum.
Avlýsingatrygging úr 335,-
Ferðatrygging 385,- íroknað virkisískoyti.
Skíðleiga í 7 dagar uml. 520,-

*Allir prísir eru fyri ein persón!*

úr 6.310,- fyri hvønn

ATLANTIC AIRWAYS

FLOGFELAG FØROYA

Áarvegur 6 · Tel 34 00 15 · irdi@ff.fo · www.ff.fo